UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvisstovan
Postbox 2048, Traðargøta 38
165 Argir

Tórshavn, tann 10. juli 2024
J. nr.: 24/17336-1
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Att.: Sigurd í Jákupsstovu, stjóri

**Heimilingarskriv til Umhvørvisstovuna um at útinna uppgávur og heimildir sambært lóg um el og fjarhita**

Umhvørvisstovuni verður latið upp í hendi at útinna tær uppgávur og fyrisitingarheimildir, sum sambært løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. mai 2024 um el og fjarhita, eru latnar upp í hendi á landsstýrisfólkinum. Undantiknar eru tó hesar heimildir:
1) kunngerðaheimildirnar í § 12, stk. 3, § 15a, stk. 4, § 15c, stk. 2, § 15e, stk. 4, § 15i, § 17, stk. 2
2) undantaksheimildin í § 16, stk. 3, og
3) ognartøkuheimildin í § 22b.

Av tí at landsstýriskvinnan hevur avgjørt at leggja omanfyri nevndu heimildir til Umhvørvisstovuna at umsita, verður samstundis gjørt av, at avgerðir tiknar av Umhvørvisstovuni, kunnu kærast til Føroya Kærustovn sambært § 18 í lógini um el og fjarhita.

Heitt verður á Umhvørvisstovuna um at lata hetta heimilingarskriv verða alment tøkt á heimasíðu síni.

Samstundis fer úr gildi "Delegasjón av heimildum landsstýrismansins sambært elveitingarlógini" dagfest 6. juni 2016.

Umhvørvismálaráðið,

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri

Avrit verður latið Føroya Kærustovni